ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

13. desember 2021
Mál: 21/21985
Viðgjørt: KÁ

Nr. 52-097/2021

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 52-097/2021 eftir tingskipanini § 52a til Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, landsstýrismann við almannamálum, frá Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmanni, um Eirargarð

Spurningar:

1. Nær verður farið undir at umvæla/dagføra Eirargarð 16?

2. Hvat fevnir arbeiðið um?

3. Nær verður arbeiðið væntandi liðugt?
4.

Svar:

Spurningarnir verða svaraðir undir einum.

Tá landsstýrismaðurin tók við, varð hann kunnaður um støðuna á fleiri av verandi bústovnum, sum eru í ringum standi. Ein lýsing, sum er gjørd av stovnunum fyri nøkrum árum síðani vísir greitt, at okkurt munagott eigur at gerast fyri at betra um umstøðurnar. Talan er í nógvum førum um gomul sethús, sum ikki eru hildin við líka og tí krevja ábøtur.

Landsstýrismaðurin valdi tí at fara til verka beinanvegin fyri at bøta um støðuna, og í 2020 samtykti Løgtingið løgtingslóg nr. 85 frá 7. juni 2020 um dagføring av vardum bústøðum, sum heimilar landsstýrismanninum at dagføra verandi bústovnar fyri í alt 33 mió. kr.

Úrslitini byrja nú at síggjast. Úr rúgvuni av smærri verkætlanum, sum eru lidnar síðani landsstýrismaðurin tók við kunnu nevnast:

- Eirargarður 14, 2, í Havn, sum er total renoveraður,
- Sambýlið á Traðarvegnum í Sandavági, har m.a. kjallarin er umbygdur,

- Hóvabrekka á Argjum, har m.a. 8 baðirúm og vátrúm eru dagførd,
- Økisdepilin í Vági (Eiðisgarður), har bygt er eitt dag- og umlættingartilboð,
- Sambýlið á Fugloyarvegnum í Havn, har m.a. tekjan er umvæld,
- Blikagøta í Runavík, har m.a. stakitt og uttanduragoymsla er gjørt.

Farið verður undir at umvæla Eirargarð 16, 1 og 2, í næstum. Arbeiðið byrjar 1. februar 2022. Tað fevnir um dagføring av 8 skolirúmum/baðirúmum. Í løtuni verður kannað, um til ber at finna fígging á játtanini við møguligari umraðfesting til at skifta ljós og leggja nýggja gólválegging. Sambært tíðarætlanini, so verður miðað ímóti, at arbeiðið við skoli-/baðirúm er liðug 1. apríl 2022.

Aðrar verkætlanir, sum eru farnar ella fara í gongd í komandi tíðum eru m.a.

- Sambýlið við Heyggjar í Havn,
- Sambýlið við Rúnavegin í Runavík,
- Sambýlið við Grønlandsvegin 63 í Havn,
- Sambýlið í Niðaragøtu í Hoyvík.

Tá komið er út í síðstu helvt í 2022, kunnu enn større úrslit síggjast av, hvat fingist er burturúr.

Í tilgongdini hevur landsstýrismaðurin umhugsað at umraðfesta onkra ætlan, og verður hetta kannað í løtuni. Í tí sambandi verður helst neyðugt at leingja verandi løgtingslóg, og hækkað fíggjarkarmin fyri at røkka heilt á mál við tí, sum landsstýrismaðurin hevur sett sær fyri. Hetta verður tikið upp politiskt í nærmastu framtíð, tá málið er búgvið.

Av større verkætlanum, sum eru ígongd, er talan um

- Bú- og umlættingarheimið á Kvíggjartúni á Argjum til børn og ung við autismu,
- Sambýli til fólk við menningartarni á Mýrini í Hoyvík,
- Sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki í Reynstúni á Argjum.

Arbeiðið á Kvíggjartúni gongur væl. Jørð- og betongarbeiðið er liðugt og farið er undir sjálva byggingina. Bygningurin verður liðugur síðst í 2022.

Betongarbeiðið á Mýrini er komið væl áleiðis, og farið verður undir byggingina í næstum. Sambært tíðarætlanini verður bygningurin liðugur síðst í 2022.

Prosjekteringin á Reynstúni er um at verða liðug og verður arbeiðið boðið út í januar 2022. Um hálvan februar 2022 verður lisitatión, og tá verður kostnaðurin kendur. Fylgjandi verður lógaruppskot lagt fyri Løgtingið. Bygningurin verður sambært tíðarætlanini liðugur síðst í 2023.

Tórshavn, 13. desember 2021

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
landsstýrismaður